# Oddabrak í Vestmanna

**Sunnudagin verður aftur brak í Vestmanna, og aftur hesaferð er tað Kyndil, ið kemur á vitjan í einum dysti millum tey bæði fremstu liðini í Atlantic Airways kappingini**

UPPTAKT
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*



*Sunnudagin er lagt upp til enn eitt brak í Vestmanna, tá ið VÍF við einum sigri á gestunum úr Kyndil kunnu taka oddasessin frá havnarliðnum.*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Tað man verða lítið at ivast í, at teir í Kyndli verða ógvuliga uppsettir til dystin sunnudagin, so at teir kunnu fáa vaska ósigurin mikukvøldið í steypakappingini av sær. 29-22 sigurin hjá VÍF í hálvfinaluni mikukvøldið var næstan ein eyðmýking av føroyameistarunum, og tað vilja havnarmenninir neyvan hava sitandi á sær.

### Leikbann og skaði

Undan dystinum sunnudagin er greitt, at Kyndil noyðist at verða Finn Hansson fyriuttan. Finnur fekk beinleiðis reytt kort í hálvfinaluni mikukvøldið fyri býtta hevnissøku, og tað er ein missur fyri Kyndil.

Hjá vestmenningum er spurningurin, um Áki G. Olsen verður klárur til dystin. Hann var ikki við í hálvfinaluni mikukvøldið, tí at hann hevur forstrekt okkurt í nakkanum. Hinvegin tóktist tað ikki nerva vestmenningar tað stóra, at hann ikki var við mikukvøldið, men tað er avgjørt ein styrkur, um hann verður klárur.

Um Kyndil ætlar sær at halda fast í oddasessinum, so noyðast teir at taka annað skinn um bak, tí um avrikið verður tað sama, sum tað var mikukvøldið, so er einki at gera. Gamaní hava kyndilsmenn vunnið báðar landskappingardystirnar móti VÍF í hesum kappingarárinum, men tað er einki yvir at dylja, at tað eru vestmenningarnir, ið hava sálarligu yvirvágina í løtuni.

### Høvuðsstaðaruppgerð

Í Havn verður dystur millum tvey av høvuðsstaðarliðunum, Neistan og H71, og bæði liðini eru sera svong eftir stigum. Neistin fekk eitt stig inni á Skála seinasta sunnudag, meðan tað er nakað langt síðani, at hoyvíkingar hava økt um sítt stigatal.

Bæði liðini mugu sigast at hava verið í einum aldudali, men spurningurin er, um ikki bæði liðini eru á veg upp aftur. Neistin vísti við javnleikinum á Skála seinasta vikuskifti, at teir eru ikki heilt fyri ongum, og avrikini seinastu umførini hava verið tey frægastu leingi.

Hoyvíkingar hava verið fyri nógvum ósigrum í seinastuni, men mikukvøldið var hugburðurin og stríðsviljin tann rætti, og um teir halda fast í honum, kann tað væl verða, at teir aftur fara at bjóða av í kappingini um bronsumerkini.

### Upp og niður hjá KÍF

Kollfirðingar tóku øll á bóli, tá ið teir seinastu sunnudag vunnu ein greiðan sigur á VÍF í Vestmanna.

Hetta vikuskiftið er KÍF á heimavølli í Hoyvíkshøllini, har teir fáa vitjan av steypafinalistunum úr StÍF.

Eyðkenni fyri júst hesi bæði lið í hesum kappingarárinum hevur verið, at tey hava verið rættuliga óstøðug. Kollfirðingar hava spælt sum brandar eitt vikuskifti fyri síðani vikuna eftir at verða fyri ongum og leggja rygg til greiðar ósigrar.

StÍF tykist hava funnið stevið eftir ein trilvandi byrjan upp á kappingarárið, men framvegis tykjast teir ikki nóg støðugir. Mikukvøldið knógvaðu teir akkurát hoyvíkingum í hálvfinaluni í steypakappingini, hóast teir góða viku frammanundan í landskappingini vundu burtur úr H71 í Hoyvík. Seinasta sunnudag høvdu teir vitjan av botnliðnum Neistanum, og tað vóru strandingar stak hepnir, at teir fingu annað stigið.

Dysturin millum KÍF og StÍF tykist tí verða rættuliga opin, men greitt er, at um liðini ætla sær at verða við í stríðnum um bronsuheiðursmerkini, so er neyðugt við einum sigri.

## SUNSET KAPPINGIN
KVINNUR

| | dystir | v - j - t | v. mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 VB | 14 | 13 - 0 - 1 | 442 | 273 | 169 | 26 |
| 2 Stjørnan | 14 | 13 - 0 - 1 | 347 | 265 | 82 | 26 |
| 3 Neistin | 14 | 10 - 0 - 4 | 398 | 302 | 96 | 20 |
| 4 Søljan | 14 | 8 - 0 - 6 | 384 | 325 | 59 | 16 |
| 5 VÍF | 14 | 5 - 0 - 9 | 328 | 328 | 0 | 10 |
| 6 StÍF | 14 | 4 - 1 - 9 | 315 | 363 | -48 | 9 |
| 7 Kyndil | 14 | 2 - 1 - 11 | 269 | 392 | -123 | 5 |
| 8 Tjaldur | 14 | 0 - 0 - 14 | 221 | 456 | -235 | 0 |

## ATLANTIC AIRWAYS KAPPINGIN
MENN

| | dystir | v - j - t | v. mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Kyndil | 3 | 2 - 0 - 1 | 391 | 313 | 78 | 12 |
| 2 VÍF | 3 | 2 - 0 - 1 | 392 | 352 | 40 | 12 |
| 3 KÍF | 3 | 2 - 0 - 1 | 332 | 357 | -25 | 8 |
| 4 StÍF | 3 | 2 - 1 - 0 | 349 | 377 | -28 | 8 |
| 5 H71 | 3 | 0 - 0 - 3 | 377 | 389 | -12 | 5 |
| 6 Neistin | 3 | 0 - 1 - 2 | 354 | 407 | -53 | 4 |

## Flogbóltsstøður

**Meistaradeild, kvinnur**

| | d | v - t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Mjølnir | 12 | 11 - 1 | 34 | 8 | 26 | 13 |
| 2 TB | 12 | 10 - 2 | 30 | 15 | 15 | 11 |
| 3 Dráttur | 12 | 6 - 6 | 27 | 21 | 6 | 8 |
| 4 ÍF | 12 | 5 - 7 | 18 | 21 | -3 | 6 |
| 5 KÍF | 12 | 4 - 8 | 14 | 27 | -13 | 4 |
| 6 SÍ | 12 | 0 - 12 | 5 | 36 | -31 | 0 |

**Meistaradeild, menn**

| | d | v - t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 SÍ | 9 | 8 - 1 | 25 | 8 | 17 | 16 |
| 2 Mjølnir | 10 | 8 - 2 | 26 | 10 | 16 | 16 |
| 3 Fleyr | 10 | 6 - 4 | 22 | 16 | 6 | 12 |
| 4 ÍF | 10 | 2 - 8 | 9 | 26 | -17 | 4 |
| 5 Fram | 11 | 1 - 10 | 9 | 31 | -22 | 2 |

# VB truplan útidyst

**Mest spennandi dysturin í fremstu kvinnudeildini hetta vikuskifti er óivað dysturin í Havn millum Neistan og VB**

UPPTAKT
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Tríggir dystir eru á skránni í Sunset-kappingini hjá kvinnum hetta vikuskifti. Í Havn fáa steypafinalistarnir úr Neistanum vitjan av VB, sum hóskvøldið í evstu løtu tapti dystin um hitt pláss í steypafinaluni til Stjørnuna.

### Er Neistin avbjóðari?

Tað hevur onkuntíð verið sagt, at Neistin kann gerast ein avbjóðari til Stjørnuna og VB um trúnina í føroyskum kvinnuhondbólti, men tað verður neyvan í ár, at so verður. Herfyri hevði havnarliðið vitjan av oddaliðnum Stjørnuni í Havn, og tá vunnu klaksvíkskvinnur ein greiðan sigur upp á níggju mál.

Nú er tað so hitt oddaliðið, VB, ið kemur á vitjan á Hálsi, og so skal neistamanningin standa sína roynd. Tað er vert at hava í huga, at liðið hjá vágbingum allarhelst er eitt sindur viðtikið bæði kropsliga og sálarliga, nú tær hava spælt heili tríggjar dystir seinastu vikuna. Seinasta vikuskifti spældu tær fyrst leygardag ein harðan dyst móti Søljuni í Vági, sunnudagin var oddadystur í Klaksvík, sum VB vann stórt, og hóskvøldið taptu tær seinnu hálvfinaluna móti Stjørnuni í Klaksvík tepurt.

Talan er altso um eitt ómetaliga strævið tíðarskeið hjá vágskvinnum, og spurningurin er, um tað fer at hava síni árin á avrikini úti á vøllinum.

### Grannauppgerð

Á Giljanesi verður tað, ið vit næstan kunnu rópa fyri eina grannauppgerð, tá ið Søljan fær vitjan av VÍF. Vágakvinnur hava verið tað stinnara av hesum báðum liðunum higartil í kappingini, men seinasta sunnudag høvdu vestmannakvinnur styrkt um liðið hjá sær við bæði Nikolinu Eyðbjørnsdóttir og Alis Høghamar, og tað ger góðan mun hjá VÍF.

Um so VÍF fær vart fyri Nicoletu Radu Hansen hjá Søljuni, so er nógv vunnið, tí vanligani skorar hon okkurt um helmingin av øllum málunum hjá Søljuni. Hinvegin kunnu eisini bæði Lina Andriulyte og Heidi Maria Akselsen gera nógv mál, so har er nógv hjá VÍF-verjuni at ansa eftir.

Hjá Søljuni ræður um at fáa vart fyri skjótálopunum hjá VÍF, har tær báðar Nikolina Eyðbjørnsdóttir og Fríða Marjunardóttir kunnu verða sera vandamiklar.

Seinasti dysturin í Sunset-kappingini um vikuskiftið verður í Klaksvík, har Stjørnan fær vitjan av StÍF. Her eru klaksvíkskvinnur stórfavorittar at vinna dystin, og hóast tær eisini hava spælt nógvar dystir í seinastuni, so eigar tað ikki at geva teimum nakrar trupulleikar sunnudagin.

StÍF er eitt av niðaru liðunum í kappingini, og tað hevði verið einki minni enn ein sensatión, um tær fingu nakað stig við sær aftur úr Klaksvík.